# Framgongd í Grønlandi

Tað gongur tann rætta vegin í grønlendska búskapinum, og samanumtikið verður vøkstur í búskapinum í 2008. Tað sigur ráðgevandi nevndin hjá forsætismálaráðnum, sum kom við sínari árligu frágreiðing í gjár. Nevndin sigur, at framburðurin stendst yvirhøvur av stórum almennum íløgum. Nevndin heldur, at Grønland eigur at fáa meiri burtur úr teimum jaligu umstøðunum á vinnuøkinum og tí veksandi virkseminum á ráevnaøkinum.



*Tað gongur frameftir í grønlendska búskapinum*
*Mynd: KNR*

# Oljan var mjørki

Flogskipararnir á einum rutuflogfari hjá franska flogfelagnum Air France boðaðu fyrradagin donsku loftferðslumyndugleikunum frá, at teir høvdu sæð ein døkkan blett á havinum nærhendis Disko í Grønlandi, og at talan eftir øllum at døma var um ein oljublett. Grønlands Kommando sendi eitt flogfar at kanna málið, men tað sá onga olju. Grønlands Kommando sigur við KNR, at tað man helst hava verið mjørki, sum flogfarið helt vera olju.

# Best røktu bygdir

**Sandavágur gjørdist best røkta bygd fyri triðju ferð, tá umhvørvisátakið 2008 var í Müllers Pakkhús í gjár.**

HEIÐURSLØNIR
*Bjørk Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Í ár luttóku átta kommunur, og tær sendu tilsamans 23 uppskot inn til metingarnevndina. Fimm kommunur fingur hesar virðislønir: Best røkta vinnuøki, sermerkt náttúruøki og tríggjar virðislønir innan Best røktu bygdina 2008. Í junimánaða ferðaðist metingarnevndin runt allar bygdirnar og avgjørdu vinnararnar.

Høvuðsvinningarnir eru eitt gávukort, ið kommunurnar kunnu nýta til Svanamerktan prentlut. Svanamerkið er ein sjálvboðin norðurlendsk umhvørvismerking av vørum og fyritøkum við 3. parts eftirliti. Fyri at fáa hesa merkin skal fyritøkan prógva, at hon kann lúka umhvørviskrøv, ið gera, at framleiðslan í allari fyritøkuni er millum tær minst umhvørvistyngjandi. Allir vinnararnir fingu eina vakra plátu úr gróti, har navnið á kommuni og heitið av virðislønini var rist á.å



**3. virðisløn: Trøllanes í Klaksvíkar kommunu**

Bygdin liggur í einum serstakliga náttúruvøkrum umhvørvi við brøttum líðum og víðum útsýni út á hav. Bygdin er sum heild ruddilig og væl skipað. Gomlu hjallarnir og vøkru rabarbu- og kálgarðarnir geva bygdini ein hugnaligan dám. Um enn ikki er komið á mál, so er kloakkskipanin komin ávegis.



**Best røkta bygd 2008: Sandavágur**

Nógv virksemi er í bygdini og karmarnir fyri felagslívi eru góðir. Nógv verður gjørt fyri at fríðka um. Bøgarðarnir eru vakrir og væl hildnir, og gamli handilin er gjørdur um til fornminnissavn. Áirnar eru reinar, og eitt frítíðarøki er gjørt við ánna. Bygdin er sum heild ruddilig og vælskipað. Einki spillivatn frá húsarhaldum verður leitt út í áir, men íbundð kloakkskipan, sum førir tað út á sjógv. Sandurin er reinur og ruddiligur. Ynskiligt er tó, at kloakkirnar verða førdar longur út á sjógv

**Metingarnevndin var umboðað av:**

SamVit,
Umhvørvisstovuni,
Føroya Forminnissavn,
Arkitektafelag Føroya
Føroya Náttúru- og umhvørvisverndarfelagi.



**2. virðisløn: Bøur í Sørvágs kommunu**

Tey hugnaligu, gomlu húsini í bygdini liggja tøtt millum smøl tún og eru sum heild væl hildin. Nógv verður gjørt fyri trivnaðin hjá ungum sum eldri. Millum annað er sparkivøllur, trampolin og eitt hugnaligt fríøki við ánna.

Á neiligu síðuni rennur kloakk út av bakkanum oman á sandin, og áin er ikki rein.



**Best røkta vinnuøki 2008: Tofta Havn**

Økið er sum heild ruddiligt og væl skipapð við ruddiligum bingjuplássi og vælvirkandi móttøkuskipan fyri burturkasti frá skipum. Lætt er hjá skipum at sleppa av við burturkasi uttan at gjalda serligan meirkostnað. Skeltingin á økinum er greið, og einki spillivatn rennur út í havnabasengið. Tað er eisini jaligt, at nýútbygda havnalagið ikki hevur breitt seg um alt økið, men hevur latið ein part av fjøruni ligið órørda.



**Sermerkt náttúruøki 2008: Hvannhagi í Tvøroyrar kommunu**

Økið liggur avbyrgt, og tú sleppur einans hagar til gongu. Jarðfrøðiliga landslagið er sjáldsamt. Plantu- og djóralívið í økinum er fjølbroytt – serliga á fjallalíðum, har seyður ikki sleppur framat.